# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TÁ NEVNDIN ER INKOMPETENT

Løgtingið avgjørdi í gjár, at løgmaður skal svara einum fyrispurningi frá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni, sum vil hava at vita, um løgmaður heldur tað vera í ordan, at Marner Jacobsen og Bjarni Olsen, fyrrverandi stjórar í Eik Banka, fingu nakrar milliónir sum »gylt lógvatak«, tá teir fóru frá sum stjórar, beint áðrenn teir høvdu stýrt bankan á húsagang.

Søgan um Føroya Sparikassa, sum varð til Eik Banka, er ein syrgilig søga um, hvussu illa tað kann ganga, tá ein inkompetent leiðsla og ein inkompetent nevnd sleppa at skalta og valta við virðum hjá øðrum – og seta alt yvir stýr, uttan at nakar steðgar ørskapinum.

Tað var ein áhugaverd sending á P1 hjá DR í síðstu viku, tá teir tríggir bankaruddararnir hjá Finansiel Stabilitet, Henning Kruse Pedersen, Jørn Astrup Hansen og Steen Hove søgdu sína hugsan um, hví tað gekk so galið hjá fleiri bankum í kongaríkinum.

Amagerbankin er eitt skrekksksempul – ikki minst tá tað snýr seg um eina út av lagi ókompetenta bankanevnd, sum gevur stjóranum partabrøv í hundrað milliónaklassanum, og sum letur stjóran sjálvan sleppa at gera av, nær hann tekur sær »gylta lógvatakið«.

Fyri vanlig fólk er tað jú beinleiðis hol í høvdið, at nevndin í Eik Banka ger av at gjalda stjórunum fleiri milliónir í fráfaringarløn, beint áðrenn bankin fer á heysin. Tað luktar langan veg av inkompetansu – ella tí, sum nógv verri er.

Tað er helst ein veruleiki, at júst inkompetansa er ein stórur trupulleiki í nógvum løgum í samfelag okkara. At skipanin við Eik Banka bara kundi endað galið, tað hava myndugleikar og bankaleiðsla vitað í fleiri ár. Í Danmark eru fleiri dømi, har tað gekk galið, tí at nevnd og leiðsla høvdu alt valdið. Bara fyri Eik Banka hevur hetta kostað Finansiel Stabilitet milliardaupphædd, eins og tað eisini hevur kostað partaeigarunum milliardaupphæddir. Fleiri aðrir húsagangir standast av hesum fallitti, tí bankin




sigur upp kredittir – eitt dømi er íbúðarbyggingin undir Kongavarða á Argjum.

Spennandi verður at frætta, hvat løgmaður hevur at siga, tí hetta er ikki bara eitt mál um tveir privatpersónar, sum fáa eina feita løn, og um ein tingmann, sum øvundar teimum. Tí vit hava onnur dømi um ókompetentar leiðslur, sum stýra sera stórum peningaupphæddum – og sum freistast at geva stórar lønir og stórar fráfaringarlønir við vón um, at tað dryppar á deknin, sum kanska kýnir leiðsluni.

Her tørvar okkum greiðar reglur, sum seta skilvísi og kompetansu í hásæti, og tí hvílir stór ábyrgd á løgmanni.

## Gylta lógvatakið stinkar av inkompetansu

# Merkið fall í Tinghelluna

Tá Pauli Ellefsen tók við sum løgmaður tann 5. januar í 1981 var landsynningurin so tráður, at flaggstongin í Tinganesi brotnaði, og flaggið fall í Tinghelluna.

Flaggdagin í ár var veðrið ikki so ringt, men línan helt ikki Merkinum, sum fall í Tinghelluna. Um tað var tí, at løgmaður er sambandsmaður, sigur søgan tó einki um...



# Onga skuldarreyv á ting og í landsstýri

Seinastu tíðina hava vit hoyrt um fleiri, sum hava mist pengar, tí at feløg eru farin av knóranum, og róð hevur verið framundir, at lóggávan skal gerast strangari til tess at steðga slíkum persónum, sum gera sær dælt av húsagangum, fyri síðani at byrja aftur, sum um einki var hent og soleiðis renna undan rokningum, sum onnur mugu gjalda fyri teir.

Tað er væl skiljandi, at fólk vilja hava lógarbroytingar, so slíkt ikki kann bera til. Danski løgmálaráðharrin, Lars Barfoed, hevur nevnt møguleikan við eini konkurskarantenu fyri fólk, sum gera sær dælt av slíkum.

Hetta er eitt sera áhugavert mál, sum er viðkomandi fyri fleiri vinnuvirki í Føroyum, og ikki minst fyri landskassan, sum eisini missir avgjøld av slíkum monnum – (tað eru sum oftast menn). Tí eiga reglarnar sjálvandi at verða herdar, ella vit skuldu havt ein almennan lista við vánaligum gjaldarum, so slík fólk ikki sluppu at virka ótálmað.

Nú verður so nógv tosað um gjøgnumskygni í øllum liðum, ikki minst í almennari fyrisiting og í politikki. Og nú tað stundar til val, so hevði verið áhugavert at sæð, at politisku flokkarnir almannakunngjørdu øll valevni á slíkum lista. Fólk, sum skylda landskassanum pengar, og fólk, sum hava varðað av partafelag, sum er farið av knóranum og skyldar fólki pengar, eiga ikki at sleppa at stilla upp uttan víðari.

Veljarin má hava trygd fyri, at løgmaður, landsstýrisfólk og løgtingsfólk ikki hava verið atvold til, at onnur hava mist pengar av teirra vanstýring, og tí eiga slík fólk ikki at sleppa at stilla upp. Politikkur snýr seg eisini um álit, og vit kunnu ikki geva skuldarreyvum – ella tilvitaðum konkursryttarum – álitið at stýra landinum, tað sigur seg sjálvt...



## Brúk fyri blokkpolitiki

EDMUND JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 12



## Nýggja reyða gongan

BJARNI DJURHOLM
KJAK Á SÍÐU 12




# Eingin koyring halgidagar

**Leið 200, sum koyrir millum Eiði og Oyrarbakka, koyrir ikki sunnudagur**

Randi Jacobsen

Flestu bygdarleiðirnar koyra hvønn dag, og ávísar halgidagar koyra tær sum sunnudag.

Men við leið 200 er øðrvísi. Eingin busskoyring er sunnudag millum Eiði og Oyrarbakka.

Hetta eru fólk í Eiðis kommunu ónøgd við.

Á heimsíðuni hjá Strandferðsluni stendur, at skírisdag verður koyrt sum sunnudag. Hví tað skal standa, tá ið ikki verður koyrt sunnudag, hava fólk ilt við at skilja.

Tveir dreingir skuldu við bussi suður til Havnar skírisdag. Ætlan teirra at fara við bussinum suður á Oyrarbakka og skifta har til leið 200.

Men eingin bussur var at koyra teir suður á Oyrarbakka. Vánaligt, hildu teir.

## LÝSINGARTORGIÐ

*Vegna tekniskar trupulleikar dátagrunninum er Lýsingartorgið ikki við í blaðnum í dag. Arbeitt verður við málinum, og biðja vit lesarar og lýsarar umbera okkum*

*Blaðstjórin*

Sosialurin Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*